


DANMARKS
NATIONALBANK

# Framtíðar reiðupeningur

**Til borgarar og fyritøkur**

DANMARKS
NATIONALBANK

FREMTIDENS KONTANTER

## Til borgarar og fyritøkur

Danski tjóðbankin er meginbankin í ríkisfelagsskapinum, og í Grønlandi og Føroyum verður sama seðlarøð nýtt sum í Danmark. Tá ið eldru donsku pengaseðlarnir og núverandi 1000-krónuseðilin fara úr gildi eftir 31. mai 2025, fara donsku pengaseðlarnir eisini úr gildi í Grønlandi og í Føroyum.

Í Føroyum verða føroyskir pengaseðlar nýttir, sum ikki eru fevndir av hesari fráboðanini.

Danski tjóðbankin og danskir myndugleikar vilja í samstarvi við grønlendskar og føroyskar myndugleikar, bankar og smásølur tryggja, at heimkallanin av eldru seðlarøðini og 1000-krónuseðlinum tekur atlit til ávís staðbundin viðurskifti og staðbundnar reglur. Hetta kann til dømis vera frástøðan millum bústað og banka umframt serligar ásetingar viðvíkjandi markinum fyri reiðupeningi.

Í Føroyum og í Grønlandi fara innflýggjanarstøð eisini at verða sett upp vegna Danska tjóðbankan, soleiðis at borgarar í Grønlandi og í Føroyum hava møguleika fyri at lata pengaseðlar inn eitt ár aftaná, at seðlarnir fara úr gildi sum gjaldmiðil í samfelagnum.

Serstakt samskiftistilfar fer at verða gjørt sum skjótast, ið tekur hædd fyri hesum viðurskiftum.

DANMARKS NATIONALBANK

Meira fæst at vita á nationalbanken.dk/fremtidenskontanter

# Framtíðar reiðupeningur

**Tað verður brúk fyri reiðupeningi í Danmark – eisini í framtíðini. Tjóðbankin setur tí tiltøk í verk fyri at tryggja, at reiðupeningur framhaldandi verður ein tryggur og lítarligur gjaldmiðil.**

### Hvat fer at henda?

- ✓ Tjóðbankin arbeiðir við at geva út eina spildurnýggja seðlarøð við virðinum 50, 100, 200 og 500 krónur. Røðin væntast at verða klár í 2028 ella 2029 og verður framleitt við nýggjastu tøknufrøðini fyri at forða fyri falsan.
- ✓ Allir eldri pengaseðlar givnir út áðrenn 2009 fara úr gildi sum gjaldmiðil eftir 31. mai2025. Sí seðlarnar á síðu 7-16.
- ✓ 1000-krónuseðilin, sum vit nýta í dag - tann við mynd av Stórabeltsbrúnni og Sólvogninum - fer úr gildi sum gjaldmiðil eftir 31. mai 2025. Sí seðlarnar á síðu 17.
- ✓ Tjóðbankin tekur stigvíst eldru pengaseðlarnar og 1000-krónuseðlin úr umfarinum, sum teir verða latnir inn í bankarnar ella verða nýttir í smásølubúðunum.
- ✓ Eftir 31. mai 2025 vera bert 50-, 100-, 200- og 500-krónuseðlin frá røðini við brúm og fornleivdum (2009-røðin) lógligir pengaseðlar í Danmark.

DANMARKS NATIONALBANK

## Pengaseðlar sum fara úr gildi

eftir 31. mai 2025

**2009**
**Brýr og fornleivdir**
Bert 1000-krónuseðilin




**1997**
**Andlitsmyndir og kirkjulist**
Allir seðlar




**1972**
**Andlitsmyndir og djór**
Allir seðlar




**1952**
**Andlitsmyndir og landsløg**
Allir seðlar




**1944**
**Býtisrøðin**
Allir seðlar




## Gildir pengaseðlar

eftir 31. mai 2025

**2009**
**Brýr og fornleivdir**
Allir seðlar uttan 1000-krónuseðilin




*Uppstigað í 2025*




*Uppstigað í 2024*




*Uppstigað í 2024*




*Uppstigað í 2020*

Yvirlit yvir seðlar, sum fara úr gildi, sæst á **nationalbanken.dk/fremtidenskontanter**

# Soleiðis gert tú

**– mvið pengaseðlarnar, sum fara úr gildi eftir 31 mai 2025**

FREMTIDENS KONTANTER

**Tú kanst gjalda við seðlunum sum vanligt**
Handlarnir hava skyldu til at taka ímóti øllum lógligum pengaseðlum sum gjaldmiðil. Tú kanst tó vera fyri, at nakrir handlar, vinnulívsfólk og privatpersónar ikki kenna eldru seðlarnar aftur.

## Tú hevur góða tíð

Eldru seðlarnir og nýggjasti 1000-krónuseðilin eru í gildi til og við 31. mai 2025. Tú hevur tí góða tíð at sleppa tær av við seðlarnar.

**31. mai 2025**

**Tú kanst brúka sjálvtøkurnar hjá tínum banka**
I nógvum sjálvtøkum kanst tú ikki bara taka pening út, men eisini seta pening inn. Tú kanst seta bæði 1000-krónuseðlar og seðlar við andlitsmyndum og kirkjulist (1997-røðin) inn á sjálvtøkurnar hjá banka tínum. Nakrar sjálvtøkur taka eisini ímóti enn eldri seðlum. Ver varug/ur við, at mark er fyri, hvussu stóra upphædd tær einstøku sjálvtøkurnar taka ímóti.

**Tú kanst seta eldri seðlar inn á konto í tínum egna banka**
Tað fer at vera ymiskar mannagongdir fyri, hvussu einstøku bankarnir fara at bjóða kundunum at seta reiðupening inn á konto. Far inn á heimasíðuna hjá tínum banka og kunna teg um, hvussu tín banki tekur ímóti seðlum.

**Tú ert vælkomin at goyma pengaseðlarnar**
Tú ert vælkomin at goyma eldri pengaseðlar og 1000-krónuseðilin sum samlaralut. Tú skalt bara vera varug/ur við, at teir fara úr gildi sum gjaldmiðil eftir 31. mai 2025.

## Hvítvaskreglur

Sambært hvítvaskreglunum hava handlar og onnur vínnulívsfólk ikki loyvi til at taka ímóti reiðum peningi upp á 15.000 kr. ella meira fyri vørur ella tænastur. Hetta er galdandi uttan mun til, um tú rindar upphæddina eina ferð ella í avdráttum.

Bankar og vekslingarskrivstovur eru eisini bundin av hvítvaskreglunum. Tú kanst tí vera fyri, at tú mást skjalprógva ella gera sannlíkt, at tú hevur útvegað peningin á løgligan hátt.

Um tú brúkar sjálvtøkur, skalt tú vera varug/ur við, at mark er fyri, hvussu stórar upphæddir tær einstøku sjálvtøkurnar kunnu taka ímóti. Eftirlit verður eisini havt við hvítvaski, tá ið tú setur pengar inn í bankan um sjálvtøkurnar.

*Ert tú ikki bankakundi, ella ert tú til dømis útidani, hevur tú møguleika fyri at lata pengaseðlarnar inn, sum eru farnir úr gildi sum gjaldmiðil, til innflýggjanarstøðini hjá Tjóðbankanum. Hesin møguleikin væntast at gerast atkomuligur við ársskiftið 2024/2025 og fer at halda fram í eitt ár, aftaná at seðlarnir eru farnir úr gildi 31. mai 2025. Nærri kunning fæst í 2024.*

DANMARKS NATIONALBANK

Meira fæst at vita á nationalbanken.dk/fremtidenskontanter

# Hví er tað neyðugt?

FREMTIDENS KONTANTER

**Hví skulu vit hava nýggjar pengaseðlar frá 2028-2029?**
Reiðupeningur er framvegis neyðugur í Danmark. Núverandi pengaseðlarnir við myndevnum av donskum brúm og fornleivdum eru framhaldandi ein tryggur gjaldmiðil í dag og komandi árini. Men skulu danskararnir eisini í framtíðini hava álit á reiðupeningin, má sniðgevingin og framleiðslan av seðlunum støðugt fylgja við tøknifrøðiligu menningini. Tí hevur danski tjóðbankin sett í verk at menna eina nýggja seðlarøð.

**Hví fara eldru seðlarnir úr gildi?**
Allir pengaseðlar, sum eru givnir út síðan 1944 og til í dag, eru gildir gjaldmiðlar, og handlar og fyritøkur hava skyldu til at góðtaka teir sum gjald. Men serliga seðlar, sum eru givnir út áðrenn 2009, kunnu í roynd og veru nýtast ógvuliga ymiskt.

Eldri seðlar, sum eru komnir út áðrenn 2009, kunnu vera truplir at rindavið í handlum og í borgarligum handli, av tí at fáir borgarar og handilsstarvsfólk kenna teir aftur og kenna seg tryggan við at taka ímóti teimum. Nakrir eldri pengaseðlar kunnu nýtast í sjálvtøkum og kontantskipanum í handlum, meðan aðrir ikki kunnu nýtast.

Tað er ikki gagnligt, at allir gildir pengaseðlar ikki kunnu nýtast á sama hátt í samfelagnum. Óvissan um, hvussu teir ymisku pengaseðlarnir kunnu nýtast, er í vanda fyri at skaða álitið á reiðupeningi í framtíðini. Tí hevur Tjóðbankin avgjørt at seta eldri pengaseðlar úr gildi eftir 31. mai 2025.

**Hví fer 1000-krónuseðilin ikki longur at vera partur av donsku seðlarøðini?**
1000-krónuseðilin er ikki neyðugur fyri at styðja uppundir tryggum og lítarligum gjaldi í Danmark. Hetta kemst eitt nú av, at reiðupeningur í dag í minni mun verður nýttur at rinda við, og at virðið á kontantgjaldi oftani er minni enn 500 kr. Samstundis seta hvítvaskreglurnar mark fyri, hvussu stórt gjaldið kann vera í reiðupeningi.

Stigvísa avtøkan av 1000-krónuseðlinum fer at minka um tørvin á smápengum í handlunum. Harvið verður tað lættari hjá handlunum at handfara smápengar uttan at avmarka møguleikan hjá borgarunum at rinda við reiðupeningi.

Samstundis metir løgreglan, at 1000-krónuseðilin í størri mun enn aðrir seðlar verður brúktur til at styðja uppundir fíggjarlig lógarbrot av ymiskum slag.

## Ansa eftir svindlarum

Ver varug/ur við, at svindlarar kunnu royna at fáa teg at flýgga reiðupening út við til dømis at siga, at teir koma frá Tjóðbankanum ella tínum banka.

Ver eisini varug/ur við, um onnur biðja teg um at veksla ella seta pengar inn fyri tey. Tú ert í vanda fyri at viðvirka til álvarsligt fígggjarligt lógarbrot.

DANMARKS NATIONALBANK

Meira fæst at vita á nationalbanken.dk/fremtidenskontanter

# Pengaseðlar, sum fer úr gildi

eftir 31. mai 2025

Allir pengaseðlar givnir út í 1944, 1952, 1972 og 1997 fara úr gildi sum gjaldmiðil eftir 31. mai2025. Tað sama er galdandi fyri 1000-krónuseðilin úr 2009-røðini.



**1944**

Býtisrøðin



**1952**

Andlitsmyndir og landsløg



**1972**

Andlitsmyndir og djór



**1997**

Andlitsmyndir og kirkjulist



**2009**

Brýr og fornleivdir

DANMARKS NATIONALBANK

Meira fæst at vita á nationalbanken.dk/fremtidenskontanter

# 1944 Býtisrøðin

Úr gildi eftir 31. mai 2025

## 5 krónur

*Hesin seðilin kann ikki setast inn á kontu. Hann hevur verið ógildur sum gjaldmiðil síðan 1954.*







## 10 krónur

*Upprunalig útgáva frá 1944.*
*Hesin seðilin kann ikki setast inn á kontu. Hann hevur verið ógildur sum gjaldmiðil síðan 1954.*







*Uppstigað útgáva frá 1947.*
*Hesin seðilin kann ikki setast inn á kontu. Hann hevur verið ógildur sum gjaldmiðil síðan 1954.*







## 50 krónur

*Givið út í 2 útgávum. Ljóst lilla og myrkt lilla.*










## 100 krónur

*Givið út í 2 útgávum. Ljóst grønur og myrkt grønur.*










## 500 krónur







Røðin var framleidd í loyndum í 1943 og 1944. Hon var nýtt til at býta um pengar í 1945 beint aftaná, at 2. veraldarbardagi endaði. Forsíðuna á flest øllum seðlunum teknaði listamálarin og teknarin Gerhard Heilmann.

## Virði

**5, 10, 50, 100 og 500 krónur**

## Sermerki

**5 krónur**
*Givið út:* 1945
*Stødd:* 130 x 72 mm

*Myndevni:*
Flættað fimmtøl | Skreytrósur við lítla ríkisvápninum í miðjuni.

**10 krónur**
*Givið út:* 1945-1947
*Stødd:* 131 x 80 mm | 130 x 80 mm

*Myndevni (uppstigað útgáva):*
Taraprýði | Skreytrósur við lítla ríkisvápninum í miðjuni.

**50 krónur**
*Givið út:* 1945
*Stødd:* 156 x 100 mm

*Myndevni:*
Bátur við fiskimonnum | Skreytrósur við lítla ríkisvápninum í miðjuni.

**100 krónur**
*Givið út:* 1945
*Stødd:* 156 x 100 mm

*Myndevni:*
Taraprýði randað við springarum| Skreytrósur við lítla ríkisvápninum í miðjuni.

**500 krónur**
*Givið út:* 1945
*Stødd:* 174 x 108 mm

*Myndevni:*
Bóndi aftan fyri plógv drigin av hestum | Skreytrósur við lítla ríkisvápninum í miðjuni.

# 1952 Andlitsmyndir og djór

**5 krónur**






**10 krónur**

*Upprunalig útgáva frá 1952. Hesin seðilin kann ikki setast inn á kontu. Hann hevur verið ógildur sum gjaldmiðil síðan 1954.*






*Uppstigað útgáva frá 1954.*






**50 krónur**






**100 krónur**






**500 krónur**






Sniðgevingin á seðlinum kom í lag í samstarvi millum arkitekt og grafikara Gunnar Biilmann Petersen, teknara hjá Tjóðbankanum Gunnar Andersen og arkitekt Ib Andersen. Pengaseðlarnir vísa andlitsmyndir av kendum danskarum á forsíðuni og landsløg á baksíðuni.

## Virði

**5, 10, 50, 100 og 500 krónur**

## Sermerki

**5 krónur**
*Givið út:* 1952
*Stødd*: 125 x 65 mm

*Myndevni*:
Thorvaldsen og marmorsteinmyndin "Tær tríggjar yndisgudinnurnar" | Vor Frue Kirke, Kalundborg.

**10 krónur**
*Givið út:* 1952/1954
*Stødd*: 125 x 65 mm | 125 x 71 mm

*Myndevni*:
H. C. Andersen og storkareiður frá Asminderød | Egeskov Mølle.

**50 krónur**
*Givið út:* 1957
*Stødd*: 153 x 78 mm

*Myndevni*:
Ole Rømer og Rundetårn | Stenvad langdys á Djursland.

**100 krónur**
*Givið út:* 1962
*Stødd*: 155 x 78 mm

*Myndevni*:
H. C. Ørsted og kumpass við einum ravmagnsleidningi | Kronborg.

**500 krónur**
*Givið út:* 1964
*Stødd*: 175 x 90 mm

*Myndevni*:
Christian Ditlev Frederik Reventlow og bóndi við hesti og plógv | Roskilde Dómkirkja.

Úr gildi eftir 31. mai 2025

# 1972 Andlitsmyndir og djór



**10 krónur**




**20 krónur**




**50 krónur**




**100 krónur**

*Givið út í 2 útgávum*




*Uppstigað útgáva frá 1995*




**500 krónur**




**1000 krónur**




Á forsíðuni á seðlunum síggjast graveraðar andlitsmyndir við støði í málningum eftir danska listamálaranum Jens Juel. Djórini á baksíðuni á seðlunum eru gjørd eftir vatnlitsmyndum og tekningum eftir teknara og arkitekti Ib Andersen og teknara Gunnar Andersen hjá Tjóðbankanum.

## Virði

**10, 20, 50, 100, 500 og 1000 krónur**

## Sermerki

**10 krónur**
*Givið út:* 1975
*Stødd*: 125 x 67 mm

*Myndevni*:
Cathrine Sophie Kirchhoff | Æða í skreytbúna.

**20 krónur**
*Givið út:* 1980
*Stødd*: 125 x 72 mm

*Myndevni*:
Pauline Tutein | Gráspurvar.

**50 krónur**
*Givið út:* 1975
*Stødd*: 139 x 72 mm

*Myndevni*:
Engelke Charlotte Ryberg | Karpa.

**100 krónur**
*Givið út:* 1974/1995
*Stødd*: 150 x 78 mm

*Myndevni*:
Sjálvsmynd Jens Juel | Firvaldur "reytt tignarband".

**500 krónur**
*Givið út:* 1974
*Stødd*: 164 x 85 mm

*Myndevni*:
Ókend kvinna, helst Franziska Genoveva von Qualen | Ferføtla.

**1000 krónur**
*Givið út:* 1975
*Stødd*: 176 x 94 mm

*Myndevni*:
Thomasine Heiberg | Íkorni.

# 1997 Andlitsmyndir og kirkjulist

**Úr gildi eftir 31. mai 2025**

### 50 krónur

*Givið út í 2 útgávum*








### 100 krónur

*Givið út í 2 útgávum*








### 200 krónur

*Givið út í 2 útgávum*








### 500 krónur

*Givið út í 2 útgávum*








### 1000 krónur

*Givið út í 2 útgávum*








Teknarin Johan Alkjær hjá Tjóðbankanum sniðgav seðlarnar. Á forsíðuni síggjast andlitsmyndir av donskum listafólkum og vísindafólkum, meðan baksíðan er prýdd við myndevnum frá mentan og kirkjulist.

## Virði

**50, 100, 200, 500 og 1000 krónur**

## Sermerki

**50 krónur**
*Givið út:* 1999/2005
*Stødd*: 125 x 72 mm

*Myndevni*:
Rithøvundurin Karen Blixen | Rossmaður í Landet Kirkju í Tåsinge.

**100 krónur**
*Givið út:* 1999/2002
*Stødd*: 135 x 72 mm

*Myndevni*:
Tónaskaldið Carl Nielsen | Basiliskur úr Tømmerby kirkju í Vester.

**200 krónur**
*Givið út:* 1997/2003
*Stødd*: 145 x 72 mm

*Myndevni*:
Sjónleikarin Johanne Luise Heiberg | Leyva frá apsis í Viborg Dómkirkju.

**500 krónur**
*Givið út:* 1997/2003
*Stødd*: 155 x 72 mm

*Myndevni*:
Atomalisfrøðingurin Niels Bohr | Stríðsklæddur riddari og dreki frá doypifuntinum í Lihme kirkju.

**1000 krónur**
*Givið út:* 1997/2003
*Stødd*: 165 x 72 mm

*Myndevni*:
Myndlistafólkini Anna og Michael Ancher | Kappingarmynd úr Bislev kirkju.

# 2009 Brýr og fornleivdir

Úr gildi eftir 31. mai 2025

**1000 krónur**

Forsíða




Baksíða




Karin Birgitte Lund hevur sniðgivið myndevnini á øllum seðlunum í røðini. Evnið er danskar brýr og fornleivdir.

Á 1000-krónuseðlinum sæst Stórabeltsbrúgvin og Sólvognurin úr Trundholm Mose.

1000-krónuseðilin er einasti seðilin úr røðini, sum fer úr gildi eftir 31. mai 2025.

## Virði

**1000 krónur**

## Sermerki

**1000 krónur**
*Givið út:* 2011
*Stødd*: 165 x 72 mm

*Myndevni*:
Stórabeltsbrúgvin | Sólvognurin úr Trundholm Mose.

**Meira fæst at vita á**
**nationalbanken.dk/fremtidenskontanter**

DANMARKS
NATIONALBANK

Danski tjóðbankin
Langelinie Allé 47
2100 København Ø

Copyright © Danski tjóðbankin 2023